# Hvat er tað, sum dregur?

*Lýsing av hví*

***nýútbúnir føroyingar***

*frá 2008-2012*

***búsettu seg har teir gjørdu***

JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi

# Innihaldsyvirlit

Fororð **5**
Kanningin **6**
Lýsing av svargevum **7**
Útbúgving og starv **10**
Virðing fyri serkunnleika **19**
Flyta tey heimaftur til Føroya? **21**
Føroyskir arbeiðsgevarar **42**

JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi

**Snið og umbróting:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Prent og liðugtgerð:** Føroyaprent

Svanamerktur prentlutur 541 705

# Fororð

Fremsta fortreyt fyri framgongd í føroyska samfelagnum er, at fólk støðast. Og farnu árini hevur føroyska samfelagið mist alt ov nógv fólk.

Fleiri kanningar eru gjørdar til tess at finna útav, hvørji hesi fólkini eru, og hví tey velja at búseta seg aðrastaðni enn í Føroyum. Við hesi kanningini leggja vit so nýggja vitan afturat: Hvar eru tey, sum heilt nýliga eru útbúgvin, og hví eru tey har, tey eru.

Er tað neyðugt at vita hetta, kann onkur spyrja. Svarið er ja. Vit mugu hava so nógva vitan sum gjørligt fyri at kunna fremja tey átøk, sum kunnu venda gongdini.

Henda kanning gevur eina neyva mynd av hví fólk raðfesta, sum tey gera - beint nú. Hon vísir hvørji tey nýútbúnu eru, hvørjar førleikar tey hava og hvar, tey eru. Hví summi koma aftur til Føroya, meðan onnur ikki gera. Og kanningin gevur eisini nakrar ábendingar um, hvat kann gera tað meira lokkandi at flyta heimaftur.

Ein avgerandi spurningur er, um tað yvirhøvur er rúm fyri øllum nýútbúnum føroyingum á okkara arbeiðsmarknaði. Tí hava vit eisini biðið nakrar arbeiðsgevarar greiða frá, hvørjar møguleikar og forðingar teir síggja, og hvørjum førleikum, teir sóknast eftir. Tað er eyðsæð, at tað er meira tørvur á summum enn øðrum - men orðini hjá stjóranum í Nema, Christiani Nagata, minna á, at ein partur av trupulleikanum rætt og slætt er vitan: “Fólk vita ikki ordiliga, hvussu óluksáliga stórir fyrimunir og møguleikar eru í Føroyum”.

Negativ umrøða er uttan iva skaðilig, og tí er loysnin ikki bara at broyta tað, sum ikki er gott. Hon er eisini at støðugt minna útisetar á tað, sum er gott. Eitt av endamálunum við hesi kanningini er júst at styrkja dialogin millum føroyskar arbeiðsgevarar og útisetar.

Tey, sum hava arbeitt við kanningini á skrivstovu Javnaðarfloksins á Fólkatingi, eru Elin Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Djóni Højgaard, Rannvá Clementsen, Silvia Súnadóttir Kristiansen, Joan Ólavsdóttir og Sjúrður Skaale. Regin Reinert, hagfrøðingur, hevur greinað tølini.

Sjúrður Skaale
***Fólkatingsmaður***

# Kanningin

Í desember 2013 varð spurnablað sent út við telduposti til 1965 føroyingar, ið vóru lidnir at útbúgva seg millum 1. januar 2008 og 31. desember 2012. Av teimum 1965 vóru tað 514 fólk, ið svaraðu spurnablaðnum.

Við kanningini royndu vit at røkka so mongum sum gjørligt í oman fyri nevnda málbólki. Tí settu vit okkum í samband við Studna, ið hevur data um øll føroysk lesandi, ið annaðhvørt hava fingið ferðastuðul uttanlands, lestrarstuðul í Føroyum ella hava fingið ÚSUN[1] stuðul. Leinkjan til spurnablaðið bleiv send til teldupostadressuna, ið tey lesandi upplýstu til Studna seinastu ferð, tey søktu um lestrarstuðul. Tískil eru tað einans tey, ið enn nýta hesa teldupostadressuna, ið høvdu møguleika at luttaka í kanningini.

Í januar 2014 gjørdu vit samrøður við seks arbeiðsgevarar í Føroyum, fyri at fáa vinkulin hjá føroyska arbeiðsmarknaðinum við í kanningina. Hesi vóru Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, Christian Nagata, stjóri í Nema, Janus Petersen, forstjóri í Bank Nordik, Herleif Hammer, rektari á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri og Sigurð Ó. Vang, stjóri á Landssjúkrahúsinum. Síðsti partur í hesum riti er ein samandráttur av høvuðssjónarmiðunum, ið komu fram í samrøðunum.

*1 ÚSUN er lestrarstuðul til føroyingar, ið lesa uttanfyri Norðurlond.*

# Lýsing av svargevum




Svargevarnir eru deildir í fýra bólkar alt eftir, hvar tey hava lisið, og hvar tey búgva í dag. Størsti svarbólkurin ***lisið uttanlands og býr uttanlands*** telur 193 svargevar, meðan ***lisið í Føroyum og býr í Føroyum*** og ***lisið uttanlands og býr í Føroyum*** telja ávikavist 151 og 152 svargevar. Klárt minsti svarbólkurin er ***lisið í Føroyum og býr uttanlands***, ið telur 18 svargevar. Av tí at bólkurin einans hevur 18 svargevar, skulu tølini viðvíkjandi hesum bólki takast við fyrivarni, tá hvør svargevi svarar til umleið 5 prosent.

> ***Vit mugu eisini hugsa um trivnaðin hjá fólkunum, sum longu eru í Føroyum. Tað vil siga eisini ungdóminum og bjóða fleiri útbúgvingar. Tess eldri tey ungu eru, tá tey fara uttanlands, tess størri eru sannlíkindini fyri, at tey koma heimaftur.***
> **Marita Rasmussen,** *stjóri í Vinnuhúsinum*




Kynsbýtið millum svargevarnar er rættiliga javnt fyri allar svarbólkarnar. Tó eru tað fleiri kvinnur í øllum svarbólkum uttan í bólkinum ***lisið í Føroyum og býr í Føroyum***.

## ALDUR




Serliga aldursbólkurin 30-34 ár er væl umboðaður millum svargevarnar. Meðan aldursbólkurin 25-29 ár eisini er væl umboðaður. Minsti aldursbólkurin er gjøgnumgangandi 20-24 ár. Hetta kann hugsast at vera orsakað av, at fleiri í aldursbólkinum 20-24 ár ikki eru liðug við sína útbúgving enn.

Talvan vísir, at bólkurin ***lisið í Føroyum og býr í Føroyum*** rúmar flest svargevum oman fyri 40 ár, samstundis sum sami bólkur rúmar flest svargevum í tí yngsta aldursbólkinum 20-24 ár. Í bólkinum ***lisið uttanlands og býr uttanlands*** eru fægst svargevar, sum eru 40 ár og eldri.

> *Eg havi varhugan av, at tað eru alsamt fleiri, ið taka útbúgvingar. Miðnámsskúlarnir standa til at bresta, og tað eru maksimal árgangirnir, sum fara ígjøgnum nú. Nógv teirra fara at fáa sær útbúgvingar, og upptøkutølini eru høg allastaðni í norðurlondum. Vit koma nokk ikki at skorta uppá fólk við útbúgvingum í framtíðini um rætt verður borið at.*
> ***Sigurð Ó. Vang,*** *stjóri á Landssjúkrahúsinum*

| Miðalaldur | Lisið í Føroyum býr í Føroyum | Lisið í Føroyum býr uttanlands | Lisið uttanlands býr í Føroyum | Lisið uttanlands býr uttanlands |
|---|---|---|---|---|
| | 33,2 | 30,8 | 32,3 | 30,8 |

Talvan omanfyri vísir miðalaldurin fyri svargevarnar. Her sæst ikki stórur munur á teimum fýra bólkunum. Tó eru tey, ið búgva í Føroyum, eitt sindur eldri enn tey, ið búgva uttanlands.

## PARLAGSTØÐA




Myndin omanfyri er yvirlit yvir parlagsstøðuna hjá svargevunum. Stórsti parturin hevur føroyskan maka, meðan 16 prosent hava útlendskan maka, og 23 prosent eru støk.

## BÚSTAÐARSÝSLA ÁÐRENN OG EFTIR LOKNAN LESTUR

*- lisið uttanlands og búgva í Føroyum*




Talvan omanfyri er yvirlit yvir, hvar í Føroyum bólkurin ***lisið uttanlands og býr í Føroyum*** býr í dag, í mun til hvar tey búðu áðrenn lesnaðin. Einastu sýslur, ið hava framgongd sambært talvuni, eru Suðurstreymoyar og Suðuroyar sýsla. Áðrenn lestrarbyrjan vóru tað 79 í bólkinum, ið búðu í Streymoyar sýslu, meðan talið í dag er 93. Allar hinar sýslurnar hava afturgongd.

# Útbúgving og starv

> *Gjøgnumgangandi seta vit nógv nýútbúgvin fólk. Men er stór kapping um starvið, so er tað sjálvandi ein fyrimunur at hava bæði góðar royndir og persónligar eginleikar, umframt góð pappírir.*
> ***Sigurð Ó. Vang,** stjóri á Landssjúkrahúsinum*

## ÚTBÚGVINGAR




Myndin omanfyri vísir yvirlit yvir, hvørji útbúgvingarøki svargevarar hava útbúgvið seg innan. Talvan vísir, at flest svargevar hava tikið útbúgving innan náttúruvísindi og tøkni – 33 prosent. Í hesum bólki eru tað serliga nakrar útbúgvingar, ið eru væl umboðaðar: heili 77 svargevar hava tikið skipsførara- ella maskinmeistaraútbúgving, meðan 23 hava tikið verkfrøði og 17 byggifrøði. Ávikavist 11 hava útbúgvið seg innan KT verkfrøði og breiðari KT tøkni. Harafturímóti eru fá, ið hava nomið sær útbúgvingar innan lívfrøði, jarðfrøði, støddfrøði og alis- og evnafrøði.

> *Ávís fak hava vit trupulleikar við at fáa mannað við kvalifiseraðum fólkum – serliga støddfrøði og alisfrøði.*
> ***Herleif Hammer,** rektari á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði*

> *Størsta avbjóðingin er at fáa fólk við røttu førleikunum. Bæði fakligum førleikum og við royndum á økinum.*
> ***Christian Nagata,** stjóri í Nema*

30 prosent hava tikið útbúgving innan hugvísindi og námsfrøði. Í hesum bólki eru serliga hesar útbúgvingar væl umboðaðar: 57 námsfrøðingar, 36 lærarar og 21 við listarligari útbúgving. 14 hava lisið fremmandamál og bókmentir, meðan 10 hava lisið søgu og 10 fornfrøði. Harafturímóti eru fá, ið hava útbúgving innan føroyskt mál, átrúnað og heimspeki.

21 prosent hava tikið útbúgving innan samfelag og handil. Í hesum bólki eru serliga hesar útbúgvingar væl umboðaðar: 22 útbúgvin innan handil og fyrisiting, 15 innan stjórnmálafrøði og 12 innan ávikavist búskap og løgfrøði.

16 prosent hava útbúgving innan heilsuverkið. Í hesum bólki eru serliga hesar útbúgvingar væl umboðaðar: 30 sjúkrarøktarfrøðingar, 15 innan medisinska diagnosu og viðgerðartøkni og 11 innan terapi og uppafturvenjing.

## HVÍ VALDI TÚ TÍNA ÚTBÚGVING?




Myndin omanfyri vísir, hvat svargevarar løgdu dent á, tá tey valdu sína útbúgving. Tey fingu høvið at seta kross við fleiri av svarmøguleikunum. Nógv tey flestu valdu útbúgving eftir áhuga, meðan góð líkindi fyri at fáa starv og møguleiki fyri vælløntum starvi eisini vóru týðandi faktorar.

> *At stjórna einum banka er fullkomiliga øðrvísi í dag í mun til 2008 og áðrenn fíggjarkreppuna. Við henni komu sera nógvar reguleringar, so mann varð noyddur at hava løgfrøðingar, búskparfrøðingar, eina fíggjardeild á høgum støði og kreditdeild á høgum støði fyri at stýra øllum. Lóggávan rætt og slætt krevur tað.*
> ***Janus Petersen,** stjóri í Bank Nordik*

> *Fróðskaparsetrið átti at bjóðað útbúgvingar innan støddfrøði.*
> ***Herleif Hammer,*** *rektari á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði*

## Í HVUSSU STÓRAN MUN HØVDU FYLGJANDI ÚTSØGNIR ÁVIRKAN Á, AT TÚ VALDI AT NEMA TÆR ÚTBÚGVING UTTANLANDS?




Myndin omanfyri er yvirlit yvir, hví svargevarar valdu at lesa uttanlands, og her høvdu svargevarar møguleika at geva fleiri svar.

Flest av svargevunum valdu at fara uttanlands at lesa, tí tey ikki kundu taka útbúgvingina í Føroyum, men eisini tí at tey høvdu eina ávísa trongd til at uppliva eitt nýtt land og standa á egnum beinum. Hinvegin halda tey í minni mun, at tað er bíligari at lesa uttanlands enn í Føroyum, og tey velja ikki at fara uttanlands, tí vinfólkini gera tað. Tað er ikki serliga stórur munur á útsøgnunum hjá teimum, sum búgva í Føroyum, í mun til tey, sum framvegis búgva uttanlands.

> *Tá vit lýsa eftir starvsfólki, so hyggja vit eftir, hvussu starvsfólkið hóskar saman við tær arbeiðsuppgávur, sum vit raðfesta. Tað merkir í praksis, at um nú onkur fer, so er tað ikki heilt víst, at tað akkurát er sama starvið ella profilurin, sum kemur innaftur.*
> ***Marjun Hanusardóttir,*** *løgmansstjóri*

## ERT TÚ Í LØTUNI Í STARVI?




Ímillum tey, ið búgva í Føroyum, eru væl færri arbeiðsleys, samanborið við tey, ið búgva uttanlands. Lægsta arbeiðsloysið sæst hjá bólkinum ***lisið í Føroyum og býr í Føroyum***. Her er umleið seytjandi hvør arbeiðsleysur. Hetta er sera lágt, samanborið við bólkin ***lisið í Føroyum og býr uttanlands***. Í hesum bólki er triði hvør arbeiðsleysur, men her skal havast í huga, at hesin svarbólkur bert telur 18 svargevar.

> *Eg eri sera imponerað av teimum ungu fólkunum, sum bjóða seg fram. Eg haldi, tey duga øgiliga væl at selja seg sjálvi. Tað, sum er torført hjá ungum, ið koma beint frá útbúgving, tað er kanska at sleppa fram at til samrøður og tílíkt, tí tey ikki hava royndirnar, men samanborið við meira tilkomin fólk duga tey betur at selja seg.*
> ***Marita Rasmussen,*** *stjóri í Vinnuhúsinum*

Í bólkinum ***lisið uttanlands og býr uttanlands*** er fimti hvør arbeiðsleysur í dag, meðan tíggjundi hvør í ***lisið uttanlands og býr í Føroyum*** er arbeiðsleysur.

Hetta reisir fleiri spurningar. Flyta útisetar ikki aftur til Føroya, fyrr enn teir fáa fast starv? Í hvussu stóran mun spælir starv inn, tá avgerðin skal takast at flyta aftur til Føroya?

Fyri at fáa rætt til arbeiðsloysisstuðul í Føroyum í dag krevur tað, at ein hevur arbeitt í Føroyum í eina tíð og goldið inn í Arbeiðsloysisskipanina. Tískil er tað ikki møguligt hjá nýútbúnum at sleppa upp í føroysku Arbeiðsloysisskipanina, um tey eru arbeiðsleys eftir loknan lesnað.

Í Danmark harafturímóti ber til hjá øllum nýútbúnum arbeiðsleysum at søkja um "dimittendssats", sum er arbeiðsloysisstuðul, ið verður veittur úr einum A-kassa. Hesin stuðul er eisini tøkur hjá føroyingum, sum hava lisið í Danmark, men føroyingar missa hendan stuðul, tá tey flyta til Føroya.

Verður skipanin í Føroyum broytt, so at nýútbúgvin eisini kunnu fáa arbeiðsloysisstuðul í Føroyum, kann hugsast, at fleiri føroyingar, ið hava lisið uttanlands, flyta beinleiðis heim eftir loknan lesnað.

> ***Í tí privata vinnulívinum vil tað typiskt vera ein hægri risiko fyri at verða koyrdur, tí fyritøkan allatíðina skal skapa úrslit á botnlinjuni. Meðan støðan er ein onnur um tú starvast hjá tí almenna. Fólk í privata vinnnulívinum verða ofta meiri avbjóðað og tí meiri virkisfús og framsøkin.***
> **Janus Petersen,** *stjóri í Bank Nordik*

## ERT TÚ Í LØTUNI Í STARVI?



| | Ja – Lisið í Føroyum og býr í Føroyum | Nei – Lisið í Føroyum og býr í Føroyum | Ja – Lisið í Føroyum og býr uttanlands | Nei – Lisið í Føroyum og býr uttanlands | Ja – Lisið uttanlands og býr í Føroyum | Nei – Lisið uttanlands og býr í Føroyum | Ja – Lisið uttanlands og býr uttanlands | Nei – Lisið uttanlands og býr uttanlands |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Longri útbúgvin (5 ár ella longri) | 2% | 0% | 0% | 0% | 12% | 1% | 16% | 3% |
| Miðallong útbúgving (3-4 ár) | 23% | 1% | 2% | 1% | 11% | 2% | 12% | 4% |
| Stytri útbúgving (1-2 ár) | 3% | 1% | 0% | 0% | 3% | 1% | 1% | 1% |

Myndin omanfyri vísir samlaða arbeiðsloysið millum svarbólkarnar býtt á útbúgvingarstig, hvar tey hava tikið útbúgvingina, og hvar tey búgva nú. Her sæst, at bólkurin við flest arbeiðsleysum er ***lisið uttanlands og býr uttanlands***. Áhugavert er eisini, at tað sæst ein munur, tó lítil, á arbeiðsloysinum millum tey, ið hava lisið í Føroyum, í mun til tey, sum hava lisið uttanlands. Her kann hugsast, at tey, ið hava lisið í Føroyum, hava størri møguleika fyri at skapa sær eitt netverk innan arbeiðsmarknaðin í Føroyum, meðan tey, ið lesa uttanlands, ikki hava sama møguleika. Tó kann sigast, at tað frá føroyskari síðu tey seinastu árini hevur verið arbeitt fyri at skapa samband ímillum vinnuna og føroysk lesandi. Eitt dømi um hetta er Jobmatch. Eisini kann nevnast heimasíðan leinkjan.fo, har føroyskar fyritøkur geva lesandi føroyingum møguleikan at skriva smærri og størri uppgávur, ið eru viðkomandi fyri fyritøkuna.

> ***At starvast hjá okkum krevur sum so altíð eina útbúgving og helst royndir. Trupulleikin er, at tá tú ert í Føroyum, so mást tú ganga uppá komprομi og góðtaka, at fólk kanska ikki hava royndir***
> **Christian Nagata,** *stjóri í Nema*

## TÍNAR ARBEIÐSUPPGÁVUR KREVJA



| | Lisið í Føroyum og býr í Føroyum | Lisið í Føroyum og býr uttanlands | Lisið uttanlands og býr í Føroyum | Lisið uttanlands og býr uttanlands |
|---|---|---|---|---|
| Tað hevur ongan týdning fyri arbeiðsuppgávurnar at hava útbúgving | 3% | 8% | 3% | 3% |
| Onga útbúgving, men tað er ein fyrimunur at hava eina slíka | 6% | 8% | 7% | 3% |
| Útbúgving á lægri støði enn ta, eg tók | 8% | 8% | 18% | 9% |
| Útbúgving á sama støði sum ta, eg tók | 77% | 75% | 66% | 73% |
| Útbúgving á hægri støði enn ta, eg tók | 6% | 0% | 6% | 12% |

Myndin omanfyri vísir, hvussu svargevarar meta sínar arbeiðsuppgávur at samsvara við sína útbúgving. Flestu svargevar meta, at teirra starv í dag krevur útbúgving á sama stigi sum hana, tey hava. Fyri allar bólkarnar er hetta galdandi fyri ímillum tveir triðingar og tríggjar fjórðingar av teimum spurdu.

Tey, sum í størstan mun meta, at teirra arbeiðsuppgávur krevja lægri útbúgving enn hana, tey hava, eru tey, sum í dag ikki búgva í sama landi, sum tey tóku sína útbúgving. Talan er um bólkarnar ***lisið í Føroyum og býr uttanlands*** og ***lisið uttanlands og býr í Føroyum***. Umleið ein fjórðingur av teimum meta sínar arbeiðsuppgávur krevja útbúgving á lægri stigi, enn ta útbúgving tey hava.

> ***Fært tú arbeiði í Føroyum, so ert tú ikki serliga gamal, áðrenn tú situr við sera stórari ábyrgd.***
> **Marita Rasmussen,** *stjóri í Vinnuhúsinum*

> *Um mann ikki hevur eina greiða meining sum fyritøka um at fáa nýggja megi inn, so er mann heldur ikki eitt attraktivt arbeiðspláss. So vit eru allatíðina opin fyri at fáa nýggj talentir inn. Men tað er fyri okkara egnu skyld – ikki fyri samfelagið. Vit hava rætt og slætt brúk fyri tí.*
>
> ***Janus Petersen,*** stjóri í Bank Nordik

Av teimum sum framvegis búgva í lestrarlandinum, eru tað 16 prosent, ið meta sínar arbeiðsuppgávur at krevja útbúgving á lægri stigi, enn ta útbúgving, tey tóku.

Bólkurin *lisið uttanlands og býr uttanlands* heldur í størri mun sínar arbeiðsuppgávur at krevja hægri útbúgving enn ta, tey tóku. Her er talið 12 prosent. Hetta er tvífalt, samanborið við bólkarnar *lisið í Føroyum og býr í Føroyum* og *lisið uttanlands og býr í Føroyum* ávikavist 6 prosent fyri báðar bólkarnar.

Hyggja vit at bólkunum, sum í størstan mun meta sínar arbeiðsuppgávur at krevja útbúgving á lægri stigi enn hana, tey hava, so er felags fyri hendan bólk, at tey eru flutt í annað land eftir lokna útbúgving. Tískil kann hugsast, at eitt starv, har arbeiðsuppgávurnar samsvara við útbúgvingina, hevur minni týdning fyri henda bólk enn bústaðarland.

## STARVSBYGNAÐUR




| | Lisið í Føroyum og býr í Føroyum | Lisið í Føroyum og býr uttanlands | Lisið uttanlands og býr í Føroyum | Lisið uttanlands og býr uttanlands |
|---|---|---|---|---|
| Sjálvstøðug/ur vinnurekandi | 0,23% | 0,00% | 1,13% | 1,13% |
| Arbeiðstakari | 31,83% | 2,71% | 29,57% | 33,41% |

Myndin omanfyri vísir starvsbygnaðin hjá svargevunum. Tað áhugaverda her er, at tað eru sera fá, ið eru sjálvstøðug vinnurekandi. Hetta bendir á, at vit í stóran mun útbúgva fólk til at verða arbeiðstakarar (og ikki arbeiðsgevarar).

Her kann hugsast, at ein partur av teimum sjálvstøðugu vinnurekandi í Føroyum hava eina vinnuútbúgving og hava tískil ikki fingið stuðul frá Studna ella ikki hava nakra útbúgving, og tí fevnir hendan kanning ikki um tey.

## ÚTBÚGVINGARSTIG BÝTT Á LESTRARLAND




Myndin til vinstru omanfyri vísir útbúgvingarstig býtt á lestrarland, og myndin til høgru vísir útbúgvingarstig býtt á Føroyar og útlandið. Tey, sum hava lisið uttan fyri Føroyar, hava í størri mun eina útbúgving á hægri stigi enn tey, ið hava lisið í Føroyum. 48 prosent av teimum, ið hava lisið í Danmark, hava lokið eina longri útbúgving (5 ár ella longri). Hetta er galdandi fyri umleið 43 prosent av teimum, ið hava lisið í Bretlandi, 75 prosent av teimum, ið hava lisið í øðrum Norðurlondum og umleið 41 prosent av teimum, ið hava lisið aðrastaðni. Einans 7 prosent av teimum, ið hava lisið í Føroyum, hava eina útbúgving, ið er 5 ár ella longur.

> *Eg haldi, at tá mann tosar um at fáa føroyingar aftur frá útlondum, so er talan typiskt um akademikarar ella fólk, ið hava tikið eina universitetsútbúgving. Tey flestu, ið arbeiða í bankum, eru útbúgvin sum lærlingar ella líknandi. Um mann tosar um starvsfólk til okkara virki – og nógv onnur virki í Føroyum – so er ein minni partur av teimum akademikarar. Men tað verður alsamt størri eftirspurningur eftir teimum.*
>
> ***Janus Petersen,*** stjóri í Bank Nordik

> ❝ *Landsfyrisitingin hevur fyri tað mesta generalistar. Vit hava avmarkaðar umstøður til bert at seta serfrøðingar.*
> ***Marjun Hanusardóttir,*** *løgmansstjóri*

Um vit leggja øll útbúgvingarlond uttan fyri Føroyar saman og samanbera tey, ið hava lisið í Føroyum við tey, ið hava lisið uttanlands, so sæst heilt greitt, at tey, ið hava lisið í Føroyum, í størri mun taka miðallangar útbúgvingar. Tey, ið taka útbúgvingar uttanlands, eru javnari býtt millum miðallangar og langar útbúgvingar.

Hetta er helst tí, at nógvar av teimum útbúgvingunum, ið kunnu takast í Føroyum, bert bjóðast út á bachelorstigi. Hugsast kann, at fleiri, ið hava tikið fyrra partin av síni útbúgving í Føroyum, fara uttanlands fyri at taka seinasta partin av útbúgvingini, tí at seinni parturin ikki kann takast í Føroyum.

Eisini kann hugsast, at ein stórur partur av teimum, ið ætla sær eina hægri útbúgving enn bachelorstig, taka alla sína útbúgving uttanlands, tí at útbúgvingin ikki verður boðin út í Føroyum. Men tað kunnu eisini vera onnur viðurskifti, sum spæla inn, tá føroyingar velja at útbúgva seg uttanlands t.d. útlongsul.

# Virðing fyri serkunnleika

### Í HVØNN MUN METIR TÚ, AT TÍN FAKLIGI SERKUNNLEIKI VERÐUR VIRDUR Í FØROYUM?




Myndin omanfyri vísir, hvussu svargevarar meta sín fakliga serkunnleika verða virdan í Føroyum frá 1 (í als ongan mun) til 7 (í sera stóran mun). Hetta vil siga, at svargevar, sum hava svarað ímillum 1 og 3 eru neilig um virðingina av teirra fakliga serkunnleika, meðan tey, ið hava svarað millum 5 og 7, eru jalig. 4 er mitt ímillum.

Bólkurin *lisið í Føroyum og býr uttanlands* er mest neiligur, tá tað kemur til hesi viðurskifti. Men hesin bólkur telur tó bert 18 svargevar, so tí skal fyrivarni takast í hesum føri. Í hesum bólki er tað meir enn helmingurin (56 prosent), ið er neiligur um virðingina fyri sínum serkunnleika. Í hinum trimum bólkunum eru ímillum 32 og 36 prosent neilig.

> ❝ *Vit seta faktisk høg krøv til umsøkjarar. Eitt nú tá vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingum, so hyggja vit serliga eftir fýra førleikum: at útinna, leiða, menna og miðla.*
> ***Sigurð Ó. Vang,*** *stjóri á Landssjúkrahúsinum*

> ❝ *Í Løgmansskrivstovuni eru tað serliga fýra dygdir, vit hyggja eftir, tá vit søkja eftir nýggjum starvsfólkum: útbúgving, royndir, persónligir eginleikar og málsligir førleikar.*
> ***Marjun Hanusardóttir,*** *løgmansstjóri*

Tey, ið hava lisið uttanlands, eru meiri jalig um virðingina fyri sínum fakliga serkunnleika í Føroyum – umleið helmingurin svarar jaligt. Her er altso ikki stórur munur á teimum, sum enn búgva uttanlands og teimum, sum í dag búgva í Føroyum.

41 prosent í bólkinum *lisið í Føroyum og býr Føroyum* meta, at sín fakligi serkunnleiki í nakran ella í stóran mun verður virdur í Føroyum. Til samanberingar hava 23 prosent av teimum, ið hava lisið í Føroyum, men sum í dag búgva uttanlands, somu jaligu meting.

### Í HVØNN MUN METIR TÚ, AT TÍN FAKLIGI SERKUNNLEIKI VERÐUR VIRDUR?

*svargevar, ið hava lisið uttanlands og búgva í Føroyum*




Myndin omanfyri vísir virðing fyri fakliga serkunnleikanum í lestrarlandinum sammett við í Føroyum. Her verður bert hugt eftir bólkinum *lisið uttanlands og býr í Føroyum*. Myndin vísir, at tey meta tað vera stóran mun á virðingini fyri sínum fakliga serkunnleika í lestrarlandinum í mun til í Føroyum. Heili 80 prosent eru jalig um virðingina í sínum lestrarlandi, meðan bert 48 prosent eru jalig um virðingina í Føroyum. Hinvegin eru 34 prosent neilig um virðingina í Føroyum mótvegis bert 8 prosentum í lestrarlandinum.

# Flyta tey heimaftur til Føroya?

> *“Fyri at fáa fleiri útbúgvin fólk til Føroya, er tað týdningarmikið, at vit umrøða okkum sjálvi eitt sindur meiri positivt. Vit skulu minna hvønn annan á at síggja møguleikarnar heldur enn forðingarnar við at búgva í Føroyum.*
> ***Marita Rasmussen,*** *stjóri í Vinnuhúsinum*

### HVUSSU NÓGV ERU FLUTT HEIMAFTUR?




Myndin omanfyri vísir, at av teimum svargevum, ið fóru uttanlands at nema sær útbúgving, eru bert 44 prosent komin aftur til Føroya at búgva.

## BÚSTAÐARLAND OG LESTRARLAND




Myndin omanfyri vísir, hvørt svargevarar hava lisið í Føroyum ella uttanlands, í mun til hvar tey búgva í dag. Stabbin til vinstru vísir, at 59 prosent av svargevum búgva í Føroyum í dag, og av teimum hevur helmingurin lisið í Føroyum, og hin helmingurin hevur lisið uttanlands.

Stabbin til høgru vísir svargevar, sum eru búsitandi uttanlands. Her síggja vit, at nógv størsti parturin av hesum bólki hevur lisið uttanlands. Myndin vísir, at tað eru størri sannlíkindi fyri, at tey, sum lesa í Føroyum, verða búgvandi í Føroyum eftir loknan lesnað. Tann størsta flytingin millum Føroyar og útheimin eftir loknan lestur er altso hjá teimum, ið hava lisið uttanlands.

Tað optimala vildi verið, at so nógvir føroyingar sum gjørligt, ið hava lisið uttanlands, fluttu aftur til Føroya eftir loknan lesnað, men út frá hesum tølum er minni enn helmingurin fluttur heimaftur. Her skal tó havast í huga, at tey, ið hava luttikið í kanningini, vóru liðug at lesa ímillum 2008 og 2012, altso er tað ikki so long tíð síðan, teir seinastu svargevarnir vórðu lidnir at lesa. Tískil kann hugsast, at ein partur av teimum flyta til Føroya í framtíðini. Tað kunnu vera ymsar orsøkir til, at summi bíða við at flyta aftur til Føroya, so sum at tey bíða við at flyta, til makin er liðugur at lesa, ella at tey ynskja at fáa starvsroyndir í útlandinum, áðrenn tey flyta aftur til Føroya.

> ***“Tað er oftast fólk, sum eru uttanlands, ið søkja starv hjá okkum. Oftani er talan um fólk, ið flyta til Føroya, tí makin hevur hug at flyta heim.***
> ***Christian Nagata,*** *stjóri í Nema*

## BÚSITANDI Í FØROYUM




Fyri at finna út av, hvat ávirkar hugin at flyta aftur til Føroya, hava svargevarar, sum búgva uttanlands, fingið 11 spurningar um viðurskifti, sum kunnu hugsast at hava týdning fyri, um tey vilja flyta aftur til Føroya. Svargevar, ið búgva í Føroyum, skulu hinvegin svara, í hvønn mun hesi somu 11 viðurskifti høvdu ávirkan á, at tey fluttu aftur til Føroya. Svargevar kundu svara á einum stiga frá 1 til 7, har 1 merkir ongan týdning, og 7 merkir sera stóran týdning. Viðurskiftini verða greinað á sama hátt, sum tey høvdu verið, um allir svargevar fingu neyvt somu spurningar. Myndirnar vísa stabbamyndir av býtinum av týdningi fyri tey 11 viðurskiftini.

## BÚSITANDI UTTANLANDS




Myndirnar omanfyri vísa, at tað er rættiliga ymiskt, hvussu stóran týdning viðurskiftini verða mett at hava. Starv og familja/vinir hava størstan týdning fyri bæði tey, ið búgva í Føroyum og tey, ið búgva uttanlands, meðan mentan og náttúra eisini hava rættiliga stóran týdning. Hini viðurskiftini vera í størstan mun mett at hava týdning millum tey, ið búgva uttanlands..Viðurskiftini, sum tey, ið búgva í Føroyum, meta hava lítlan og ongan týdning, eru viðurskifti, sum í flestu førum tala ímóti at flyta aftur til Føroya – hesi eru sosialar veitingar, veður, kostnaðarstøði, ferðamøguleikar, politiska skipanin og lønarviðurskifti. Hinvegin eru hesi viðurskifti meiri týdningarmikil fyri tey, ið búgva uttanlands.

## MIÐAL AV VIRÐUM, SUM HAVA TÝDNING FYRI AT FLYTA TIL FØROYAR




Myndin omanfyri vísir miðaltalið fyri tey 11 viðurskiftini uttan mun til, hvar svargevar búgva. Hesi miðaltøl samsvara heilt væl við tær niðurstøður, ein kann gera, við at eygleiða teir svargevar, ið svara 7 (sera stóran týdning) fyri viðurskiftini. Niðanfyri er ein greining gjørd fyri at fáa eina einfalda lýsing, har bert verður hugt eftir, hvussu stórir partar av ymisku bólkunum hava svarað "Sera stóran týdning" fyri tey 11 viðurskiftini.

Næstu 11 stabbamyndirnar vísa teir svargevar, ið svara 7 til ymisku viðurskiftini. Niðurstøður verða gjørdar fyri hvørja mynd sær.

## STARV




Sløk helvt av svargevunum siga, at starv hevur sera stóran týdning fyri, um tey vilja búgva í Føroyum. Her er talið eitt vet hægri fyri kvinnur, 52 prosent, mótvegis 44 prosentum fyri menn. Tað er eisini ymiskt, hvussu týdningarmikið aldursbólkarnir meta starv at vera, men mynstrið er ógreitt, tí talið er væl lægri fyri aldursbólkarnar 20-24 ár og 35-39 ár enn fyri hinar bólkarnar. Tey, ið hava útlendskan maka leggja nógv størri dent á starv enn svargevar við føroyskum maka. Myndin er sera greið viðvíkjandi útbúgving: Tess longri útbúgving, tess størri týdning hevur starv, tá ið bústaður skal veljast. Bólkurin ***lisið uttanlands og býr uttanlands*** leggur væl størri dent á starv enn hinir bólkarnir.

> *"Vit leggja fyrst og fremst dent á fakliga útbúgving, tá vit søkja eftir fólki. Síðani hyggja vit eisini eftir, um tey eru egnað og duga at fáast við ung. Útbúgvingin vigar klárt mest í fyrstu atløgu, tí uttan hana kanst tú ikki undirvísa. Tú skalt hava ávísar førleikar. Aftaná tað er tað sjálvandi royndir og kanska onnur ting, ið viðkomandi fæst við.*
>
> ***Herleif Hammer,*** *rektari á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði*

> *"Á starvsfólkadeildini royna vit at duga viðkomandi viðurskifti viðvíkjandi skattaviðurskiftum, barna-ansing og bústaðar viðurskiftum, tí vit fáa nógvar umsøkjarar, ið eru búsitandi uttanlands.*
>
> ***Sigurð Ó. Vang,*** *stjóri á Landssjúkrahúsinum*

## FAMILJA/VINIR




Heili 63 prosent av svargevum siga, at familja og vinir hava sera stóran týdning fyri, hvar tey velja at búseta seg. Talið er eitt sindur hægri fyri kvinnur, 67 prosent, mótvegis 59 prosent fyri menn. Tað er eitt týðiligt rák, at tess eldri fólk gerast, tess størri týdning hava familja og vinir, tá ið bústaðarland skal veljast. Ikki heilt óvæntað, so er stórur munur á, um fólk eru í parlagi ella ikki. 66 prosent av teimum, sum eru í parlagi, siga familju og vinir at hava sera stóran týdning, meðan bert 52 prosent av teimum støku siga tað sama. Tey, ið hava føroyskan maka, leggja eitt sindur størri dent á familju og vinir enn svargevar við útlendskum maka. Longdin á útbúgvingini sær ikki út til at hava stórvegis ávirkan á, hvussu stóran týdning fólk meta familju og vinir at hava. Bólkurin *lisið uttanlands og býr uttanlands* sigur ikki í eins stóran mun og hini, at familja og vinir hava týdning fyri hugin at flyta aftur til Føroya.

## MENTAN




20 prosent av svargevum søgdu mentan at hava sera stóran týdning fyri, hvar tey høvdu hug at búgva. Tey yngru og tey eldru tykjast leggja stóran dent á mentan. Tó er bólkurin við teimum undir 24 ár sera lítil, so úrslit viðvíkjandi hesum bólki skulu takast við fyrivarni. Bólkurin *lisið uttanlands og býr uttanlands* heldur ikki mentan hava eins stóran týdning sum hinir bólkarnir.

## SOSIALAR VEITINGAR




Tað eru bert 9 prosent, sum meta sosialar veitingar at hava sera stóran týdning fyri, hvar tey velja at búgva. Kvinnur meta sosialar veitingar at hava størri týdning enn menn. Støk leggja minni dent á sosialar veitingar enn tey, sum eru í parlagi.

Hetta kemst helst av, at fleiri av teimum, sum eru gift ella eru í parlagi, hava børn og tískil oftari hava tørv á ella gleði av sosialum veitingum. Tey, ið hava útlendskan maka, siga sosialar veitingar hava nógv størri týdning enn tey, ið hava føroyskan maka. Tey, ið búgva í Føroyum, leggja ikki so stóran dent á sosialar veitingar sum tey, ið búgva uttanlands. Tað er eingin loyna, at sosialu veitingarnar í nógvum førum eru betri í Norðurlondum enn í Føroyum. Tí kann tað væl hugsast, at manglandi sosialar veitingar í nøkrum førum er ein beinleiðis forðing fyri at flyta aftur til Føroyar.

## VEÐRIÐ




Bert 7 prosent av svargevum siga, at veðrið hevur sera stóran týdning fyri, hvar tey velja at búgva. Dupult so ofta eru tað kvinnur enn menn, sum siga veðrið at hava sera stóran týdning. Veðrið hevur størri og størri týdning fyri hugin til at búgva í Føroyum, tess eldri fólk gerast. Tey, ið hava útlendskan maka, leggja eisini størri dent á veðrið, og tað gera tey eisini, sum búgva uttanlands.

## KOSTNAÐARSTØÐI




Samanlagt siga 11 prosent av svargevum, at kostnaðarstøði hevur sera stóran týdning fyri hugin at búgva í Føroyum. Hvørki kyn, aldur ella borgarlig støða hava nakra serliga ávirkan á, hvat fólk halda um týdningin av kostnaðarstøðinum. Hinvegin halda svargevar við útlendskum maka nógv oftari, at kostnaðarstøði hevur heilt stóran týdning, 21 prosent, mótvegis bert 9 prosentum av teimum, ið hava føroyskan maka. Tess longri útbúgving, tess minni dentur verður lagdur á kostnaðarstøði, og tað hongur helst saman við, at fólk við longri útbúgving hava hægri inntøku enn fólk við styttri útbúgving. Heili 22 prosent av teimum, ið hava lisið og búgva uttanlands, siga kostnaðarstøði hava sera stóran týdning. T.v.s. at fyri ein stóran part av føroyingunum, sum býr uttanlands, er kostnaðarstøðið í Føroyum ein beinleiðis forðing fyri at flyta heim aftur.

## FERÐAMØGULEIKAR




11 prosent av svargevum siga ferðamøguleikar hava sera stóran týdning fyri hugin at búgva í Føroyum. Tað er sera stórur munur á kvinnum og monnum, har ið 15 prosent av kvinnunum leggja stóran dent á ferðamøguleikar, meðan talið bert er 6 prosent fyri menn. Tað er ikki løgið, at fólk við útlendskum maka og fólk, sum búgva uttanlands, leggja størri dent á góðar ferðamøguleikar.

## NÁTTÚRA




23 prosent av svargevum siga náttúruna hava sera stóran týdning, tá ið tey velja Føroyar til ella frá. Í elsta aldursbólkinum, 40 ár ella eldri, siga 42 prosent, at náttúran hevur sera stóran týdning. Týdningurin av náttúruni minkar við longdini á útbúgvingini. Eitt sindur fleiri í bólkinum *lisið í Føroyum og býr í Føroyum* siga náttúruna hava størri týdning enn hinir bólkarnir.

## POLITISKA SKIPANIN




Bert 9 prosent siga politisku skipanina hava sera stóran týdning. Tað er ikki serliga stórur munur á ymsu bólkunum. Tó víkja tey við útlendskum maka og bólkurin *lisið uttanlands og býr uttanlands* frá hesum viðvíkjandi. Tað er ikki greitt, hvat ið svargevar hugsa um, tá ið spurt verður um politisku skipanina, og helst eru tað mong ymisk viðurskifti, sum kunnu gera seg galdandi hjá ymisku svargevunum.

> *Tað má ein hugburðsbroyting til. Vit mugu hugsa føroyskt. At mann hugsar, at vit ynskja at vera við í einum samfelag, ið vil økja um sína vitan í framtíðini, og at her skal vera liviligt. Vit skulu ikki hækka skattin, men hækka umsetningin. Tað ger mann við at keypa føroyskt. Í veruleikanum átti mann ikki at sloppið at keypt aðrastaðni frá, uttan so at kappingin er ov vánalig í Føroyum, ella tí tað ikki finst í Føroyum.*
>
> ***Christian Nagata,*** *stjóri í Nema*

## FAKLIGAR AVBJÓÐINGAR




18 prosent av svargevunum siga fakligar avbjóðingar hava sera stóran týdning, tá ið tey velja bústaðarland. Talið er nógv hægri fyri kvinnur enn fyri menn, 24 prosent fyri kvinnur mótvegis 11 prosentum fyri menn. Tíðin, tá ið bert mannfólk valdu longri útbúgving og yrkisleið, er farin. Tað er eisini munur á aldursbólkunum, men tað er trupult at fáa eyga á nakað ávíst mynstur. Eingin serligur munur er á støkum og pørum, men tey, ið hava útlendskan maka, leggja væl størri dent á fakligar avbjóðingar. Tað var kanska hugsandi, at fólk við longri útbúgving løgdu størri dent á fakligar avbjóðingar, men so sær ikki út til at vera. Tey, ið búgva í Føroyum, leggja minni dent á fakligar avbjóðingar enn tey, ið búgva uttanlands. Um endamálið í størst møguligan mun er at fáa fólk at flyta heim aftur á klettarnar, er sostatt umráðandi at stimbra føroyska arbeiðsmarknaðin, soleiðis at hann í framtíðini er førur fyri at skapa fleiri arbeiðspláss við neyðugum fakligum avbjóðingum.

> *Tann sterkasta organisatiónin er vanliga hon, ið hevur starvsfólk við fleiri ymiskum viðkomandi útbúgvingum. Soleiðis fært tú eina góða blanding. So fært tú allar vinklarnar við.*
>
> ***Marjun Hanusardóttir,*** *løgmansstjóri*

> *Møguleikin fyri tey ungu her er, at tú kemur í eitt starv og hevur møguleika fyri at menna teg frá A til Z og arbeiða teg upp ígjøgnum hierakiið. Tú kanst hoppa millum eina røð av ymsum uppgávum, sjálvt um tú ikki akkurát hevur ta útbúgvingina. Møguleikarnir fyri tey, ið hava hug at vera generalistar, eru nógv fleiri í Føroyum. Men ynskir mann at vera serfrøðingur, so hava vit færri møguleikar í Føroyum.*
>
> ***Christian Nagata,*** *stjóri í Nema*

## LØNARVIÐURSKIFTI




13 prosent av svargevunum siga lønarviðurskifti hava sera stóran týdning fyri hugin at búgva í Føroyum. Eins og við fakligum avbjóðingum er ein størri partur av kvinnum enn av monnum, sum leggur dent á lønarviðurskiftini. Harafturat eru tað teir somu bólkarnir, sum skiltu seg út í spurninginum um fakligar avbjóðingar, sum eisini skilja seg út her. Tey við útlendskum maka og tey, ið búgva uttanlands, leggja nógv størri dent á lønarviðurskifti enn hini. Sera fá av teimum, ið búgva í Føroyum (3 prosent), halda, at lønarviðurskiftini hava sera stóran týdning.

### Faktor- og bólkagreining

Samanlagt eru 11 ymisk viðurskifti, sum eru viðgjørd á myndunum frammanfyri. Hesi 11 viðurskiftini kunnu bólkast í tríggjar størri bólkar:

- **Forðingar**
- **Yrkisleið**
- **Tilknýti**

Hesir tríggir bólkarnir eru gjørdir eftir eini sonevndari faktorgreining. Ein faktorgreining brúkar sambandið millum ymsu viðurskiftini til at seta viðurskifti saman, sum kunnu hugsast at umboða fleiri síður av somu søk.

Faktorgreiningin av teimum 11 viðurskiftunum eyðmerkti tríggjar faktorar. Fyri at síggja, hvat ið hesir faktorar umboða, ber til at hyggja eftir sonevndum “factor loadings”, sum eru at síggja í talvuni niðanfyri. Við at taka miðaltalið fyri svarini fyri tey 11 viðurskiftini, kann ein einfald bólking av svargevum gerast.

| Factor loadings | FAKTOR 1 *forðingar* | FAKTOR 2 *yrkisleið* | FAKTOR 3 *tilknýti* |
|---|---|---|---|
| Kostnaðarstøði | 0.905 | 0.247 | -0.015 |
| Ferðamøguleikar | 0.846 | 0.300 | 0.037 |
| Sosialar veitingar | 0.700 | 0.168 | 0.164 |
| Politiska skipanin | 0.666 | 0.381 | 0.155 |
| Veðrið | 0.595 | 0.138 | 0.199 |
| Fakligar avbjóðingar | 0.339 | 0.777 | 0.254 |
| Starv | 0.220 | 0.627 | 0.122 |
| Lønarviðurskifti | 0.574 | 0.582 | 0.014 |
| Mentan | 0.108 | 0.116 | 0.711 |
| Náttúra | 0.145 | 0.096 | 0.667 |
| Familja/vinir | 0.011 | 0.058 | 0.482 |

## Lýsing av bólkunum

Bólkarnir verða nú lýstir og skilmarkaðir við at taka fram høvuðstættir hjá hvørjum einstøkum bólki. Havast skal í huga, at bólkarnir fevna um nógvar ymiskar persónar, so lýsingarnar skulu sjálvandi takast við fyrivarni.

Av øllum svargevunum vórðu 12 prosent bólkaðir í bólkin ***forðingar***. Bólkurin ***yrkisleið*** hevði 31 prosent, meðan bólkurin ***tilknýti*** var nógv tann størsti við 57 prosentum. Myndirnar niðanfyri vísa, hvussu demografiskir bólkar eru býttir upp á faktorbólkarnar.

### *Forðingar*

Tey, ið enda í bólkinum ***forðingar***, svara í miðal høgt uppá viðurskiftini

- **Kostnaðarstøði**
- **Ferðamøguleikar**
- **Sosialar veitingar**
- **Politiska skipanin**
- **Veðrið**

Tey, ið enda í hesum bólki, síggja í flestu førum forðingarnar, tá ið tey hugsa um at flyta aftur til Føroyar ella um tað at búgva í Føroyum. Tað er eyðsæð, at arbeiðast skal fyri at fáa henda bólkin so lítlan sum gjørligt. Fyri at onkur av hesum skal enda í einum av hinum báðum bólkunum, eru helst fleiri viðurskiftir, ið skulu broytast. Ongi av viðurskiftunum eru viðurskifti, ið kunnu broytast uttan stórvegis hóvaSták. Tað er tí sera ósannlíkt, at svargevar, ið eru í hesum bólki høvdu verið bólkaðir øðrvísi, um sama kanning bleiv gjørd um t.d. eitt ár.

Heldur fleiri kvinnur enn menn síggja forðingar sum avgerandi, tá ið tey velja at búseta seg. Makin hevur stóran týdning fyri, hvønn faktorbólk svargevarnir verða bólkaðir í. 11 prosent av teimum, ið hava føroyskan maka, eru í bólkinum “Forðingar”, meðan heili 21 prosent av teimum við útlendskum maka eru í sama bólki. Longd av lesnaði tykist ikki at hava stórvegis týdning. Myndin avdúkar, at 23 prosent av teimum, sum hava lisið uttanlands, kanska hava valt at búseta seg uttanlands einamest vegna viðurskiftini, sum eru bólkað sum forðingar fyri at flyta til Føroyar.

### *Yrkisleið*

Tey, ið enda í bólkinum ***yrkisleið***, svara í miðal høgt uppá tey trý viðurskiftini:

- **Fakligar avbjóðingar**
- **Starv**
- **Lønarviðurskifti**

Heldur ikki hesi viðurskifti kunnu broytast frá degi til dags. Tó ber kanska til við skilagóðum búskaparpolitikki og skilagóðum arbeiðsmarknaðarpolitikki yvir longri tíð at bøta um hesi viðurskifti.

31 prosent av svargevunum enda í hesum bólkinum. Fyri kvinnur er talið 33 prosent, meðan talið er 29 prosent fyri menn. Bólkurin 20-24 ár er sera lítil, og tí skal lítla talið upp á 7 prosent fyri henda bólkin takast við fyrivarni. Burtursæð frá tí, sær yrkisleið út til at hava minni og minni týdning við aldrinum.

Fólk við útlendskum maka leggja nógv størri herðslu á yrkisleið enn tey, ið hava føroyskan maka. Tey, ið búgva uttanlands og serliga bólkurin ***lisið uttanlands og býr uttanlands***, enda ofta í hesum bólkinum.

Tess longri útbúgving, tess størri dent leggja fólk á yrkisleið. Hetta kann kanska tykjast óheppið. Eitt framkomið land hevur tørv á vælútbúnum fólki við longri útbúgvingum. Um vit senda fólk av landinum, kunnu vit koma at skúgva tey yvir í bólkin, sum í størri mun leggur dent á yrkisleið og harvið fær lægri sannlíkindir fyri at flyta heim aftur á klettarnar.

Um endamálið er at fáa fólk at flyta heim aftur á klettarnar, so skal hetta ikki gerast við, at tey geva yrkisleið lægri týdning. Heldur eigur at verða miðað eftir at broyta viðurskiftini í Føroyum, soleiðis at fleiri av teimum, ið velja yrkisleið, eisini fáa møguleika fyri at velja eina yrkisleið í Føroyum.

### *Tilknýti*

Bólkurin ***tilknýti*** eru tey, sum í miðal hava svarað hægst upp á viðurskiftini

- **Mentan**
- **Náttúra**
- **Familja/vinir**

Hesin bólkurin er nógv tann størsti við 59 prosentum. Heldur fleiri kvinnur enn menn eru í hesum bólki, og tað tykist sum sannlíkindini fyri at koma í henda bólkin økist við aldrinum. Her skal havast í huga, at kanningin umfatar fólk, sum hava verið lesandi í tíðarskeiðinum frá 2008 – 2012 og samstundis fingið stuðul frá Studna. Tey, sum eru í bólkinum 40 ár ella eldri, hava tí í flestu førum verið eitt sindur eldri, áðrenn tey fluttu av landinum og tí havt eitt sterkari tilknýti til Føroya enn tey, ið vóru ung, tá ið tey fluttu heimanífrá.

Ikki óvæntað, er sera stórur munur á teimum, ið hava føroyskan maka og teimum, ið hava útlendskan maka. Tá ið føroysk lesandi ella nýútbúgvin uttanlands fáa sær útlendskan maka, minka sannlíkindini fyri, at tey flyta heim aftur á klettarnar samstundis munandi.

Tess longri útbúgving, tess minni dentur verður lagdur á tilknýti, og tess størri dentur verður lagdur á yrkisleið. Tey, ið búgva í Føroyum, leggja nógv størri dent á tilknýti enn tey, ið búgva uttanlands.

Sostatt er týdningarmikið at styrkja føroysku umhvørvini í útlondum, soleiðis at útisetar varðveita sítt tilknýti til Føroya, og sostatt eru størri sannlíkindi fyri, at tey flyta heimaftur.

### HVAR ROKNAR TÚ VIÐ AT BÚGVA UM 10 ÁR?




Í kanningini bleiv eisini spurt um, hvar svargevar rokna við at búgva um 10 ár. Myndin omanfyri vísir, hvar svargevar rokna við at búgva býtt á lestrar- og bústaðarland. Tað eru serliga tey, sum longu búgva í Føroyum, sum í stóran mun vænta at búgva í Føroyum um 10 ár (73 og 66 prosent).

Í bólkinum ***lisið uttanlands og býr uttanlands*** eru 28 prosent, ið vænta at tey búgva í Føroyum um 10 ár. Men í sama bólki eru tað 42 prosent, ið rokna við, at tey búgva uttanlands um 10 ár. Tað sama er í stóran mun galdandi fyri útisetar, ið hava tikið sína útbúgving í Føroyum. 39 prosent vænta, at tey búgva uttanlands um 10 ár.

Umleið ein fjórðingur av svargevum siga seg ikki vita, hvar tey búgva um 10 ár. Tað er sjálvandi týdningarmikið at halda fast í teimum, sum longu búgva í Føroyum, men tað er serliga millum tey, ið ikki hava tikið støðu enn, at ein innsatsur skal gerast fyri at fáa tey aftur til Føroya. Roknast kann við, at tilknýtið til Føroya minkar, tess longri tíð tey búgva uttanlands, men enn eru tey ikki so fastlæst í síni støðu.

> *“Tann serstøðan vit eru í sum samfelag, at meginparturin av okkara ungdómi fer uttanlands at lesa, hon er heilt serstøk. Tað er ein stór avbjóðing at halda sambandið við tey, og tað er ongin ivi um, at tað ikki verður gjørt nokk. Men bæði Jobmatch og leinkjan.fo eru sera góð átøk.*
>
> ***Marita Rasmussen,*** *stjóri í Vinnuhúsinum*

## HVAR ROKNAR TÚ VIÐ AT BÚGVA UM 10 ÁR?




Verandi bústaður hevur sjálvandi avgerandi týdning, so tvær myndir eru gjørdar. Ein fyri tey, ið búgva í Føroyum og ein fyri tey, ið búgva uttanlands.

Av teimum, sum fyrst og fremst síggja forðingar í sambandi við at búgva í Føroyum, búgva bert 16 svargevar í Føroyum. Tey flestu av teimum, sum búgva í Føroyum í dag, vænta eisini at búgva í Føroyum um 10 ár. Serliga bólkurin tilknýti væntar, at Føroyar eisini verður bústaðurin um 10 ár. 71 prosent av hesum rokna við at verða verandi, og er tað eitt sindur fleiri enn í hinum bólkunum, samstundis sum færri av teimum eru í iva um, hvar ið tey vænta at búgva um 10 ár.

Mest áhugaverda úrslitið er helst, at 66 prosent av teimum, ið leggja størst dent á yrkisleið, og sum í dag búgva í Føroyum, eisini rokna við at búgva í Føroyum um 10 ár. Bólkurin, ið leggur størst dent á yrkisleið, er ikki ein bólkur, ið av sær sjálvum kemur heim aftur til Føroya eftir loknan lesnað uttanlands. Um umstøðurnar eru tær røttu, er tó ikki óhugsandi, at fleiri av hesum flyta heimaftur. Tí er umráðandi at virkað verður fyri, at viðurskiftini hjá hesum bólki fyri at flyta til Føroya blíva so góð sum gjørligt. Viðurskiftini, sum hugsað verður um, eru tey viðurskifti, sum definera bólkin: Fakligar avbjóðingar, starv og lønarviðurskifti.

Bólkurin, sum fyrst og fremst velur at búgva í Føroyum orsakað av tilknýti til Føroya, sær út til at vera sera trúfastur. Flestu teirra, 71 prosent, vænta eisini at búgva í Føroyum um 10 ár. Heldur færri enn fyri hinar bólkarnar, 22 prosent, vita ikki hvørjum landi, tey búgva í um 10 ár.

*Helst kann gerast meiri fyri at halda samband við lesandi uttanlands, men vit eru við í jobmatch og hava kunningarfund fyri læknalesandi í summarfrítíðini.*
***Sigurð Ó. Vang,*** *stjóri í Landssjúkrahúsinum*

## HVAR ROKNAR TÚ VIÐ AT BÚGVA UM 10 ÁR?




Av teimum, sum búgva uttanlands og eru í bólkinum ***forðingar***, búgva 47 svargevar í Danmark í dag. Hetta er uttan iva orsøkin til, at heili 49 prosent vænta at vera verandi í Danmark um 10 ár. 23 prosent siga seg ikki vita, meðan tað hóast alt eru 19 prosent, sum rokna við at flyta til Føroya innan næstu 10 árini.

Av teimum, ið leggja dent á yrkisleið og búgva uttanlands í dag, vænta 26 prosent at flyta heim innan næstu 10 árini, meðan 41 prosent rokna við at búgva uttanlands. 32 prosent siga seg ikki vita, og kemst hetta høga talið helst av, at fleiri av teimum eru til reiðar at flyta bústaðarland, um røttu yrkisleið umstøðurnar eru til staðar.

Bólkurin, ið leggur størst dent á tilknýti til Føroya, býr í nógv størstan mun longu í Føroyum. Men tað eru hóast tað 54 svargevar í hesum bólki, sum búgva uttanlands. Tað kunnu tað uttan iva vera fleiri orsøkir til, og 43 prosent av teimum rokna eisini við at búgva í Føroyum um 10 ár, meðan bert 30 prosent rokna við framvegis at búgva uttanlands. 28 prosent av teimum siga seg ikki vita, hvar tey rokna við at búgva um 10 ár.

# Føroyskir arbeiðsgevarar

## Skjótt at fáa stóra ábyrgd

> *"Um tann sum kemur til Føroya veruliga vil, tímir og hevur hegni, so eru nógvar spennandi avbjóðingar, og tað kann vera skjótt at koma langt*
> ***Marjun Hanusardóttir,** løgmansstjóri*

Arbeiðsmarknaðurin í Føroyum rúmar í størri mun generalistum enn serfrøðingum. Altso, um ein er serfrøðingur innan eitt lítið øki, kann tað verða torført at sleppa at arbeiða innan júst hetta økið í Føroyum. Hinvegin eru tað fleiri fyrimunir á tí føroyska arbeiðsmarknaðinum hjá teimum, ið hava eina meiri breiða útbúgving. Fleiri av arbeiðsgevarunum samanbera føroyska arbeiðsmarknaðin við tann útlendska. Teir vilja vera við, at føroyski arbeiðsmarknaðurin er til fyrimuns fyri tey, ið ynskja stóra ábyrgd og spennandi størv. Leiðin frá skúlabeinki til stóra ábyrgd á arbeiðsplássinum er altso ikki eins long í Føroyum sum uttanlands.

Christian Nagata, stjóri í Nema samtakinum, metir, at mann í Føroyum hevur møguleika at hoppa ímillum eina rúgvu at ymiskum uppgávu-økjum, ímeðan mann uttanlands ofta situr við einum lítlum øki, ið ein gerst serfrøðingur innan.

## Tørva fólk við náttúruvísindaligum og tekniskum útbúgvingum

> *"Avbjóðingin at fáa starvsfólk er so vítt tann sama, sum man sær aðrastaðni. Tað mangla fólk, sum hava hendurnar skrúvaðar rætt upp á ella hava ein tekniskan førleika.*
> ***Marita Rasmussen,** stjóri í Vinnuhúsinum*

Innan summi øki kann tað vera ein avbjóðing hjá føroysku arbeiðsgevarunum at finna starvsfólk við teimum røttu førleikunum. Felagsnevnarin fyri ymsu arbeiðsplássini er, at teimum tørva fólk við náttúruvísindaligum og tøkniligum útbúgvingum.

Rektarin á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, Herleif Hammer, sigur, at tey hava ein afturvendandi trupulleika við at finna skikkað fólk at undirvísa í støddfrøði og alisfrøði. Á Landssjúkrahúsinum hava tey ringt við at finna starvsfólk, sum eru serútbúgvin innan eitt ávíst heilsuøki. Her er í størstan mun talan um serlæknar, men eisini til tíðir sersjúkrarøktarfrøðingar.

Marita Rasmussen, stjóri á Vinnuhúsinum, sigur, at hennara fatan er, at arbeiðsmarknaðinum í Føroyum tørvar fólki við tekniskum førleikum, alt frá maskinfólki til verkfrøðingar. Samstundis sigur hon, at hetta ikki einans er ein tørvur í Føroyum, men sæst eisini uttanlands.

## At skapa tilknýti

> *"Vit kundu hugsað okkum, at fleiri lesandi gera uppgávur hjá okkum. Serliga samfelagsvísindaliga vegin. Tað er eisini nakað, sum vit møguliga fara at gera meira við í framtíðini.*
> ***Sigurð Ó. Vang,** stjóri á Landssjúkrahúsinum*

Fyri at skapa tilknýti ímillum vinnuna og tey lesandi eru fleiri av arbeiðsgevarunum á einum máli um, at Jobmatch, sum hevur verið fyriskipað tey seinastu árini, er ein góð byrjan. Fleiri, av teimum vit tosaðu við, søgdu, at tey sum arbeiðsgevarar saktans kundu gjørt meira fyri at gera seg sjónlig fyri lesandi, men hetta ikki varð raðfest nóg høgt – sum oftast vegna manglandi tilfeingi.

Eisini vóru tað fleiri arbeiðsgevarar, ið nevndu møguleikan at nýta heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum, leinkjan.fo. Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, sigur tó, at tað er ein avbjóðing bæði at fáa fyritøkur at skráseta verkætlanir og at fáa lesandi til at skráseta seg á heimasíðuni.

Sigurð Ó. Vang, stjóri á Landssjúkrahúsinum, sigur, at tey royna at hava samband við føroysk læknalesandi uttanlands við einum árligum kunningarfundi, sum liggur í summarfrítíðini. Her upplýsa tey um Landssjúkrahúsið sum arbeiðspláss, um gransking vm. og á tann hátt skapa samband við læknalesandi føroyingar.

### Búgva uttanlands og søkja starv í Føroyum

> *Eg meti, at ein triðingur ella helvtin av umsøkjarunum eru búsitandi uttanlands.*
>
> ***Herleif Hammer,** rektari á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði*

Sambært arbeiðsgevarunum søkja fleiri føroyingar, ið eru búsitandi uttanlands, starv í Føroyum. Á summum arbeiðsplássum eru oman fyri helmingurin av umsøkjarunum búsitandi uttanlands. Hetta vísir eisini tað, sum er komið fram í hesi kanning; at føroyingar hava lyndi til at bíða við at flyta heim, til tey hava fingið starv í Føroyum.

### Útbúgving og starvsroyndir

> *Vit seta ikki bert fólk eftir, hvat tey hava av royndum, men vit hyggja eftir hvør teirra profilur er. Um onkur er grammur eftir at royna seg, so fáa tey møguleika fyri at vísa, at tey kunnu skapa úrslit. Ein slíkur kulturur gevur pláss fyri nýggjum og ungum kreftum.*
>
> ***Janus Petersen,** stjóri í Bank Nordik*

Arbeiðsgevarar í hesi kanning leggja í flestu førum alstóran týdning á hægri útbúgving, tá størv skulu mannast. Hetta er ikki óvæntað, tí fokus í hesi kanning eru størv, ið krevja hægri útbúgving, og tí hava samrøðurnar til hesa kanning einamest snúð seg um slík størv. Somu arbeiðsgevarar seta tó eisini fólk við lægri ella ongari útbúgving í onnur størv, men hesi størvini eru ikki fevnd av hesari kanning.

Arbeiðsgevarnir siga, at tá teir skulu seta fólk í starv, verður tað gjørd ein heildarmeting av útbúgving og starvsroyndum hjá umsøkjarunum. Er tað fakliga upp á pláss, verður síðani hugt eftir starvsroyndunum hjá umsøkjarunum, ið teir flestu arbeiðsgevararnir meta hevur týdning.
Tað, at starvsroyndir spæla ein týðandi leiklut, kann hugsast at gera tað trupult hjá nýútbúnum at fáa fótin innum á arbeiðsmarknaðinum. Á Landssjúkrahúsinum er tað tó ikki nakað, ið týðir uppá, at tað er verri hjá nýútbúnum at fáa starv. Stjórin, Sigurð Ó. Vang, sigur nevniliga, at tey hvørt ár seta nógv nýútbúgvin í starv.

Marita Rasmussen sigur, at tað kann verða ringt hjá nýútbúnum at fáa starv, tí tey mangla royndirnar. Tí metir hon tað hava stóran týdning, at tey duga at selja seg sjálvi til ein arbeiðsgevara. Hetta metir hon, at tey ungu duga munandi betur, samanborið við tilkomin fólk.

### Rekrutering av starvsfólki

> *Tað, at hava eina setanartilgongd, krevur nakað av orku. Tað tekur tíð, og tú mást gera tingini ordiligt. Og tað er væl møguligt, at fyritøkurnar ikki síggja seg hava tilfeingi og orku til tað.*
>
> ***Marita Rasmussen,** stjóri í Vinnuhúsinum*

Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, metir, at tað í føroysku vinnuni er nógv rekrutering uttan almennar starvslýsingar, bæði til leiðarastørv og onnur størv, ið krevja ymiskar førleikar. Hetta merkir, at fólk verða sett, uttan at starvið verður lýst leyst, nakað Marita Rasmussen metir vera ein trupulleika hjá vinnuni.

Christian Nagata sigur, at sjálvt um tey longu hava eina hóming av, hvønn tey vilja seta í starv, so royna tey eisini at lýsa hetta sama starvið leyst fyri at síggja, hvørji onnur fólk eru har úti.

Á teimum almennu arbeiðsplássunum er ikki talan um sonevnda beinleiðis "head-hunting" av starvsfólki. Øll tey føstu størvini verða lýst leys, men um bráðfeingis tørvur stingur seg upp, verða avloysarar viðhvørt settir í tíðaravmarkað starv, uttan at starvið verður lýst leyst.

Á Landssjúkrahúsinum eru tað eisini undantøk, har størv ikki verða lýst leys, men tá er talan um serlæknar í tíðaravmarkaðum starvi.

## Síggja møguleikar heldur enn forðingar

*Eg trúgvi, at tann negativa umtalan, sum vit hoyra um Føroyar, hevur ávirkan á, um fólk flyta heim ella ikki. Fólk vita ikki ordiliga, hvussu ólukksáliga stórir fyrimunir og møguleikar eru í Føroyum.*
***Christian Nagata,** stjóri í Nema*

Í fleiri av samrøðunum við arbeiðsgevarnar varð komið inn á, hvussu føroyingar síggja Føroyar. Fleiri vildu vera við, at føroyingar hava lyndi til at umtala Føroyar meira negativt, enn rætt er. Fleiri av arbeiðsgevarunum mettu tað vera eitt eyðkenni fyri føroyingar, at dentur í nógv størri mun verður lagdur á forðingar heldur enn møguleikar. Føroyingar grenja eisini um viðurskifti, sum ein einki kann gera við, so sum veðrið. Sum Marita Rasmussen segði: *"Vit vita, at veðrið er so í Føroyum, hví blíva vit við at grenja um tað?"*

Fjølmiðlarnir kunnu hava stóra ávirkan á, hvørja fatan føroyingar uttanlands hava um Føroyar, og teir kunnu verða við til at varðveita eina negativa lýsing av Føroyum.

Tað skal ein hugburðsbroyting til, so føroyingar verða betri til at síggja teir møguleikar, sum eru í Føroyum. Onkur arbeiðsgevari metti, at føroyingar í alt ov stóran mun hótta við at flyta av landinum, tá okkurt ikki hóvar teimum.





*Vit vilja fegin takka øllum sum hava givið sítt íkast til kanningina, bæði privatum og almennum stjórum og almennum myndugleikum*

JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi

jaf.fo

JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi